


**Søkt verður eftir einum ráðgeva til virksemi, sum er knýtt at Totalview og Løttløn.**

Starvsøkið fevnir um brúkarahjálp, installatión, uppsetan og ráðgeving. Sum frálíður má roknast við eini ávísari spesialisering.

Tú ert fyrikomandi og hevur lætt við at tosa við fólk og ert álitisvekjandi. Tú sært loysnir heldur enn trupulleikar, og tú hevur evnini at koma frá tørvi kundans til røttu loysnina.

Tað er ikki eitt krav, at tú hevur tøkniligan kunnleika, men vit vænta, at tú hevur vilja og hegni at læra teg tøkniligu síðuna, t.d. at seta teg inn í Microsoft SQL og líknandi tøkni.

Vit bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har vit arbeiða tvørtur um fakmørk, og har fakligu avbjóðingarnar eru í hásæti.

Góðir møguleikar eru fyri persónligari menning og fyri eftirútbúgving. Vit bjóða eina kappingarføra løn, sum verður ásett eftir royndum og útbúgving.

Umsóknin við prógvum skal sendast til Edvard S. Remberg á teldupostadressu **esr@formula.fo**.

Eru spurningar til starvið, ert tú vælkomin at senda ein teldupost til áðurnevndu teldupostadressu.

Umsóknarfreistin er:
**Mikudagin 29. september 2010.**

formula

©2010 | 1XPETUR.COM

Formula | Stiðjagøta 11 | Postboks 1078 | FO-110 Tórshavn | Tel (+298) 344000 | www.formula.fo



STARVSFÓLK

# **SØLUFÓLK** TIL BAKKAFROST

Søkt verður eftir dugnaligum sølufólki til Bakkafrost Sales, Glyvrar. Bakkafrost Sales tekur sær av allari sølu hjá Bakkafrost samtakinum. Vørurnar verða seldar á altjóða marknaðinum, serliga í EU, USA, Eysturevropa og Fjareystri.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um sølu av vørum hjá Bakkafrost, samskifti við kundar, gerð av søluuppgerðum, avrokningar, skrásetingar, greiningar v.m.

**Útbúgving og førleikar**
- Tú hevur viðkomandi útbúgving
- Tú dugir enskt í skrift og talu
- Tú hevur góðan telduførleika

**Persónligir eginleikar**
- Tú ert fyrikomandi
- Tú hevur lætt við at samskifta
- Tú ert fleksibul
- Tú hevur eitt skipað arbeiðslag
- Tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Tú torir at taka avgerðir

**Løn og setanartreytir**
Løn og setanartreytir eru í samráð við leiðsluna.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum verða at senda til

**P/f Bakkafrost Sales**
Att.: Frederik Hansen, søluleiðara
Bakkavegur 9
FO-625 Glyvrar

ella við teldubrævi til frha@bakkafrost.com

Umsóknarfreistin er 19. september 2010.

**Meira at vita?**
Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú seta teg í samband við Frederik Hansen á tel. 23 50 04.

sansir.fo

Bakkafrost er størsta alifyritøka í Føroyum. Bakkafrost hevur ræði á allari virðisketuni frá smolti til liðugvøruframleiðslu. Bakkafrost framleiðir m.a. feskan laks til sushimarknaðin og lidnar porsjónsvørur til stórar handilsketur. Bakkafrost leggur dent á lívfrøðiliga trygd, dugnalig starvsfólk, lágkostnaðarframleiðslu, virðisøking og vakstrarmøguleikar. Bakkafrost er skrásett á Oslo Børs. Umleið 450 starvsfólk starvast á Bakkafrost.

BAKKAFROST
ESTABLISHED 1968

Bakkavegur 9 · PO Box 221 · FO-625 Glyvrar · Tel +298 40 50 00 · Fax +298 40 50 09 · www.bakkafrost.com